## EG MEINI TAÐ

# Er oljan eitt vælsignilsi?



*Durita Holm skrivar:*

Herfyri hitti eg eina føroyska konu sum glað segði mær, at hon var vorðin millióningur, tí hon hevði partabrøv í Atlantic Petroleum. Talan var um tvær milliónir og nú var einki óført.

Olja er funnin á føroyskum øki, og tað sum vit higartil bara nokkso hypotetiskt hava hugsað um, er nú nógv nærri veruleikanum — sannlíkt er, at oljuævintýrið fer at vælsigna Føroyar í øllum sínum forførandi veldi.

Men er tað í veruleikanum nakað ævintýr? Og er tað nakað vælsignilsi? Sjálv livi eg í løtuni mitt í einum sokallaðum oljuævintýrlandi — Noregi við sínum túsundtals brúgvum, tunellum og oljusjeikum. Onga uttanlandsskuld hevur Noreg, men óteljandi milliardir í oljugrunni. Teir mongu norðmenninir í skínandi BMW-Audi- og Mercedes bilum við fartelefon-forleingjara permanent fast í oyranum, einsamallir í bilunum, men tó við djúpari foyru í pannuni, og álvarsliga tosandi í forleingjaran. Teir bera vitnisburð um ævintýrið og tað flótandi svarta vælsignilsið.

Samfelagslig broyting nýtist als ikki at vera av tí ringa, øll samfeløg broytast alla tíðina í størri ella minni mun, sjálvt tey mest avbygdu smásamfeløgini djúpt inni í Amazonas. Broyting er ein náttúrligur partur av at vera samfelag, og eingin ivi er um, at pengar er eitt hitt sterkasta amboðið til samfelagsliga broyting. Ikki bara tað. Tað er eisini eitt effektivt amboð til persónliga og mentunarliga broyting. Tað er ikki nakað mystiskt ella løgið í tí, pengar er jú ikki nakað passivt, pengar eru í allar hægsta grad aktivir. So sum pengar virka í dag, hava teir eina kraft í sær sjálvum, eina kraft sum menniskjuni bara í ein ávísan mun stýra. Pengar hava eisini eina autonoma kraft sum er uttan fyri okkara ávirkan.

Tað er ikki ringt at ímynda sær, at um ein partur av oljupengunum enda í Føroyum, so fáa vit eina prísøking á fleiri økjum, t.d. húsaprísir (tað sæst longu nú í høvuðsstaðarøkinum), t.v.s at fólk mugu arbeiða meira fyri yvirhøvur at hava tak yvir høvdið. Tað førir í sínum lagi til meira strongd, fólk verða útbrend, og tað endaliga úrslitið er, at eydnupillarar verða mest selda vøra á apotekunum.

Ein annar konsekvensur av ov nógvum pengum er, at tann íbúgvandi kraftin í teimum hevur lyndi til at broyta virðini, ið fólk seta sær í sínum persónliga lívi. Pengar hava eina forflatandi effekt, har tann stóri bilurin og tey dýru stílrøttu mótaklæðini brádliga yvirtaka ein stóran part av virðissamansetingini í høvdinum á fólki. Virðir, sum í seinasta enda eru asosial og lítið samanbindandi. Tey handla um status og mátið er peningaligt ríkidømi.

Tað sum er so syndarligt við einari slíkari virðissamanseting er, at hon lættliga kann skúgva nógv av teimum serstakt flottu føroysku virðunum til viks. Ofta tá vit sammeta okkum við onnur lond, dámar okkum at leggja dent á, hvussu vit í Føroyum, í mum til nógva aðrastaðni, ikki noyðast at ringja áðrenn vit støkka inn á gólvi hjá fólki. Ella vit tosa um hvussu vit í Føroyum kenna grannar okkara, ella hvussu vit hava bæði beinini niðri á jørðini. Vit hava bókstaviliga sagt enn samband við jørðina - eplir, seyður, fuglur, fiskur og grind, eru enn ein partur av okkara lívi og mentan. Ein bindiliður til siðsøguna sum ger, at vit í hesum umskiftandi heiminum hava samband við nakað støðugt og óbroytuligt. Hetta ger, at vit ikki missa okkum sjálvi burtur í fremmandgerðini og identitetskreppum, sum eru ein alsamt vaksandi trupulleiki í okkara grannalondum. Ikki minst í tí oljuvælsignaða Noregi, har fleiri og fleiri av teimum sokallaðu væleydnaðu missa fótafestið í øllum tí nýggja, har fleksibilitetur og ríkidømi eru lyklaorð. Nú leita urbanir norðmenn við lykt eftir teimum virðunum, sum tey í pengarúsinum kastaðu fyri borð.

Ein íslendskur granskari hevur víst á, at føroyingar eru tað fólkið í Norðurlondum, sum nýtur minst heiligvág fyri sálarligar trupulleikar. Kanska tað ikki er so undrunarvert, tá man hyggur at teimum virðum sum framvegis speglast í føroysku mentanini. Men um vit ikki ansa okkum, og ikki hava eina tilvitaða og hugsunarsama støðu til peningsins autonomu kreftir, so vænti eg, at vit um 20- 30 ár eru líka burturvilst, forvirrað og frustrerað sum nógv fólk í tí ríka Noregi. Har kanst tú ikki longur hyggja í nakað tíðarrit ella blað uttan at fólk siga frá sínum eksistensiellu trupulleikum. Øll eru tey samd um, at tað postmodernaða pengafikseraða samfelagið hevur skyldina.

**Vikuskifti**

Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720, teldupostur: turid@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Turið Kjølbro

Býráðsvalið í Havn 1976:

# Fólkaflokkurin størstu framgongdina – Javnaðarflokkurin styrkti støðu sína

»Broytingarnar við býráðsvalið í Havn gjørdust størri, enn fólk flest høvdu væntað. Serliga vakti tað ans, at uttanflokkalistin hjá Peturi í Gong fekk so stóra undirtøku, at hann fekk ein lim valdan afturat teimum trimum, ið listin hevði frammanundan«. Soleiðis skrivaði Sosialurin eftir býráðsvalið í Havn 2. desember 1976



*Hvat hava hesir tríggir í kvittanum? Marius Weihe, Georg Thorsteinsson og Petur Christiansen*



FYRI 25 ÁRUM SÍÐANI
*Eirikur Lindenskov*

Tann stóri sigursharrin við býráðsvalið í Havn gjørdist Fólkaflokkurin, sum fekk tríggjar mans valdar í býráðið. Tað er ein meira, enn Fólkaflokkurin hevði. Fólkaflokkurin hevur áður havt tríggjar limir í býráðnum. Hann misti triðja mannin við valið í 1964. Í atkvøðum fekk Fólkaflokkurin 989, og tað er ein framgongd upp á 279 atkvøður.

Á Fólkaflokslistanum fekk Petur Christiansen 193 atkvøður. Kári Thorsteinson 116 og Eliesar Arge 97. Við fyrstu uppteljingina stóð á jøvnum millum Niels Debes og Essa Arge, men við fínteljingina broyttist støðan við einari atkvøðu. Annars lógu tær fylgjandi atkvøðurnar hjá Fólkaflokkinum ógvuliga javnt. William Sloan og Johan Wang fingur nevniliga hvør sínar 95 atkvøður.

### Fýra mans valdar

Uttanflokkalistin hjá Peturi í Gong fekk fýra limir í tað komandi býráðið: Ingi Mohr 222 atkvøður, Heðin Mortensen 209 og Petur í Gong 210. Dánjal Larsen, sum er porkeningur, fekk 148 atkvøður.

Tilsamans fekk listin hjá Peturi í Gong, ið hevur sitið í Tórshavnar býráð síðani 1962, 1153 atkvøður, og eru tað 242 atkvøður fleiri enn við valið í 1972.

### Helt støðuna – tó framgongd

Triðstørstu framgongdina hevði Javnaðarflokkurin við býráðsvalið og er somuleiðis triðstørstur í atkvøðutali. Javnaðarflokkurin fekk tilsamans 808 atkvøður. Tað eru 157 fleiri enn við býráðsvalið seinast.

Báðir býráðslimirnir hjá Javnaðarflokkinum vórðu afturvaldir,

Jákup Sune Jacobsen við 221 atkvøðum og Leivur Johannesen við 167 atkvøðum. Næstur teimum kom Hanna Lisberg við 80, Pole Jacobsen við 73 og Hermann Jacobsen við 64 atkvøðum. Einar 50-60 atkvøður restaðu í, at Javnaðarflokkurin fekk ein mann afturat.

### Lítla framgongd

Sambandsflokkurin varðveitti tveir limir í býráðnum, men eitt skifti fór fram. Ístaðin fyri Martin Petersen varð Petur F. Christiansen, ið áður hevur sitið í býráðnum, valdur við 108 atkvøðum. Hin maðurin hjá Sambandsflokkinum er Sofus Sivertsen, sum fekk 110 atkvøður. Martin Petersen kom teimum næstur við 77 atkvøðum.

Sambandsflokkurin fekk tilsamans 655 atkvøður. Við valið í 1972 fekk flokkurin 608 atkvøður, so talan er um ein vøkstur upp á 47 atkvøður.

### Størstu afturgongdina

Størstu afturgongdina hevði Tjóðveldisflokkurin. Við býráðsvalið í 1972 var Tjóðveldisflokkurin næststørstur við 723 atkvøðum, meðan hann við valið í seinastu viku bert fekk 524 atkvøður. Tað er eitt fall í atkvøðum upp á 199. Henda stóra afturgongdin førdi við sær, at Tjóðveldisflokkurin misti annan av teimum sitandi býráðslimunum, Finn Johansen. Finnur Johansen, ið hevur sitið eitt skeið í býráðnum, fekk 97 atkvøður. Næstur honum kom Trúgvi Árting við 64 atkvøðum.

Ólavur Michelsen varð afturvaldur við 170 atkvøðum.

Tjóðveldisflokkurin fekk sostatt bert ein mann við yvir 500 atkvøðum, so annað kann ikki sigast, enn at limurin er dýrur í mun til uttanflokkalistan, har limirnir eru valdir við í miðal 288,25 atkvøðum.

### 74 atkvøður fleiri

Sjálvstýrisflokkurin hevði við býráðsvalið eina framgongd upp á 74 atkvøður. Tilsamans fekk hann 386 atkvøður.

Ebbe Mortensen varð valdur við 70 atkvøðum. Hann hevur sitið í býráðnum áður – bæði sum valdur limur og eitt langt tíðarskeið fyri Heina Olsen, ið ikki lat seg stilla uppaftur í farna valskeiði.

### Kjartan fall

Við fínteljingina hendi tað, at Kjartan Mohr fall. Við fyribils uppteljingina valkvøldið var hann annars komin inn.

Kjartan Mohr hevur, eitt valskeið undantikið, sitið í Tórshavnar býráð síðani 1949. Hann hevur eisini sitið sum býráðsformaður.

Við valið í farnu viku fekk Framburðsflokkurin 277 atkvøður. Tað vóru 69 færri enn við býráðsvalið fyri fýra árum síðani.

Í tí komandi býráðnum eru fimm limir núvaldir: Kári Thorsteinsson, Petur F. Christiansen, Ebbe Mortensen, Ingi Mohr og Dánjal Larsen. Av teimum hava Petur F. Christiansen og Ebbe Mortensen sitið í býráðnum áður.